## Hugsa nógv um kynslívið

Ein vanligan arbeiðsdag hugsar ein kvinna 34 ferðir um kynslívið ella eina ferð hvønn 14. minutt. Tað vísir ein kanning, sum 1.000 kvinnur hava luttikið í. Kanningin avdúkar, at kvinnurnar hugsa fyrst og fremst um kynslívið saman við egnum manni. Á øðrum plássi eru menn, sum tær hava sæð, og í triðja lagi hugsa tær sum fyrrverandi drong ella mann. 53 prosent viðganga, at tær hava hug á onkrum, sum tær arbeiða saman við.



## Lýtt í Miðevropa

Tað var rættiligt vár- ella næstan summarveður við sól og hita nógvastaðni í Miðevropa um vikuskiftið. Í Stuttgart og øðrum býum í Suðurtýsklandi vístu hitamátararnir upp í 24 stig í gjár, og í Chur har norðuri í Sveis var hitin 23 stig, sum eisini er met har hesa tíðina á árinum. Tað gamla metið, sum var 21,4 stig, var frá 1960. Vanliga frystir tað í 2.000 metra hædd í Alpunum á februar, men í gjár var einki frost fyrr enn 3.200 metrar uppi í fjøllunum.

# Í herna móti skattaskjólum

**Týskland og Bretland eru farin í herna móti borgarum, sum hava goymt pening í eitt nú Liechtenstein. Roknað verður við, at tað finst ein milliard í ógoldnum skatti**

SKATTASKJÓL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Upprunaliga søgdu bretsku skattamyndugleikarnir nei takk til ein lista við nøvnum á fólki, sum høvdu krógvað pening burtur í skattaskjólinum Liechtenstein. Í staðin vendi viðkomandi sær til týsku fregnartænastuna, sum fekk ein lista við 750 nøvnum á týskum borgarum, sum hava pening standandi í bankum í lítla Alpulandinum.

Hetta gjørdist eitt stak væleydnað tiltak hjá týsku skattamyndugleikunum við loyniliga listanum – sum týskarar góvu beint omanfyri 30 milliónir fyri – og tað sannførdi at enda bretsku myndugleikarnar at rinda tíggju milliónir fyri ein líknandi lista við bretskum borgarum.

Vælvitandi keldur siga, at listin inniheldur nøvnini á um hundrað ríkum bretum við pengum í Liechtenstein, og roknað verður við, at hesir hava eina milliard í ógoldnum skatti.

Listin er keyptur innanfyri seinastu vikurnar, tó at hann upprunaliga var boðin bretsku myndugleikunum í 2006. Týskar keldur vilja enntá vera við, at listin kann hava verið boðin HM Revenue & Customs, bretsku skattamyndugleikunum, longu í 2005. Ein talsmaður fyri HMRC sigur, at bretar ætlaðu at bíða fyri at vita, hvat onnur lond, serstakliga Týskland, fóru at gera við listan.

- Vit samstarva við onnur lond um hetta málið. Vit eru varin, tað ber ikki til bara at fara fram eftir fummum. Vit vilja tryggja okkum, at skattgjaldarans peningur verður skilagott nýttur, sigur talsmaðurin.

Skattamyndugleikarnir í Bretlandi kalla keypið av listanum fyri eitt kvetti, og eru nú í ferð við at seta seg í samband við fólkini á listanum.

- Upplýsingarnir eru fyrsta floks og leiðir okkum til fólk, sum snýta í skatti, so vit fáa rætta upp á hetta, sigur talsmaðurin.

### Hentir upplýsingar

Ein týskur embætismaður, sum vil vera ónevndur, segði, at keldan, sum setti seg í samband við týsku fregnartænastuna, BND, gramdi seg um, at bretsku myndugleikarnir tóku sær ov góða tíð at svara, og tí kvetti hann alt samband við London.

- Soleiðis sum vit skiltu tað, hevði Bretland stóran áhuga í upplýsningunum, men av einari ella aðrari orsøk fór handilin ongantíð fram. Men tað er møguligt, at okkurt slag av handli fór fram seinni, sigur embætismaðurin.

Í fjør gjørdi BND ein handil við persónin, sum lat ein DVD við upplýsingum um týskar statsborgarar, sum høvdu goymt pening í bankunum í Alpulandinum, samstundis sum teir góvu honum ein nýggjan samleika.

Týsku skattamyndugleikarnir hava brúkt upplýsingarnar sdeinastu tvær vikurnar, og kannað í hundraðtali av húsum og bankaskrivstovum. Eingin er tó enn ákærdur fyri skattasvik.

Ákæruvaldið í Bochum samskipar kanningina, og har varður sagt, at talan er um meiri enn tann eina bankan í Liechtenstein.

Kanningin, og serliga leikluturin hjá týsku fregnartænastuni, hevur skapt øði í Liechtenstein, Sveits og øðrum skattaskjólum, skrivar Financial Times.




*Milliardir av skattakrónum eru krógvað burtur í bankum í Liechtenstein*

# 75 milliónir fyri nummarplátuna

**Arabiski handilsmaðurin, Saeed Khouri frá Sameindu Arabisku Emiratunum, legði 75 milliónir krónur á borðið fyri eina nummarplátu við talinum 1 á**

VÆLGERÐ

*Leo Poulsen*

Tað er ikki júst pengar, sum hann manglar, Saeed Khouri frá Sameindu Arabisku Emiratunum. Hann gjørdi ikki mætari enn at gjalda 75 milliónir krónur fyri eina nummarplátu við talinum 1 á, við eina uppboðssølu, har pengarnir fóru til vælgerðandi endamál.

Eg tók av, tí talið 1 er tað besta talið, og eg vil verða bestur í verðini, segði 25-ára gamli handilsmaðurin, sum er vorðin høvuðríkur upp á ognaríløgur.

Gamla metið fyri eina nummarplátu varð sett í desember í fjør, tá eitt syskinabarn hjá Saeed Khouri keypti eina av slagnum við talinum 5 á – fyri 18 milliónir krónur.

Pengarnir frá hesari uppboðssøluni fara sum nevnt til vælgerðandi endamál, nevniliga eina endurvenjingarmøstøð fyri ferðsluskaðar.

Enn er ikki víst, hvør bilur fær heiðurin av nummarplátini, men hann verður neyvan í bíligara endanum.

Í Europa er prísstøðið fyri óvanligar nummarplátur ikki so høgt, men fyri tað eru keypararnir minst líka forhippaðir í at nýta pengar upp á dreingjadreymir. Í Onglandi keypti ein formel 1 fjeppari, handilsmaðurin Afzal Khan, í síðsta mánaði nummarplátuna F1 fyri umleið fimm milliónir krónur, og Chelsea-eigarin Roman Abramovich gav útvið tríggjar milliónir krónur fyri nummarplátuna VIP 1, skrivar danska blaðið Børsen.



*Saeed Khouri tók djúpt í lumman, tá hann keypti nýggja nummarplátu*